## Russiskt á Televarpinum

Tey, sum í gjárkvøldið hugdu eftir Champions League dystinum millum Manchester United og Celtic á Rás1 hjá Televarpinum, fingu eina heldur øðrvísi uppliving burturúr. Fyrstu løtuna av dystinum var nevniliga russiskur frásøgumaður til dystin. Hvat sagt var, mundu tey fægstu skilja, men myndirnar vóru so í øllum førum har, og frásøgnin gjørdist lættari at skilja, tá tað eftir einar 20 minuttir varð skift til norskt.



## Ronaldinho heimsins besti aftur

Fysiski venjarin í AC Milan sigur, at um nakrar mánaðir verður Ronaldinho aftur heimsins besti fótbóltsspælari. - Venjingin hjá honum fer at hava við sær, at hann fer at spæla væl í desember, og eftir vetrarsteðgin hevur hann fingið møguleika at fyrireika seg væl til várið, og hann verður aftur heimsins besti spælari, sigur Daniele Tognaccini.

# Bilurin skal klistrast til

**Átta ár eftir at hann kom til júst uppflutta EB/Streym, kann Sorin Anghel rópa seg føroyameistara. Eitt heiti, sum hann hevur stremba eftir øll árini. Og sum hann nú skal arga við á arbeiðsplássinum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Nú er einki sum eitur. Stjórin skal so sanniliga fáa at vita, at EB/Streymur hevur vunnið gullið, sigur Sorin Anghel*
*Mynd: Sofus D. Johannesen*

Ein tann mest týðandi spælarin hjá EB/Streymi øll árini, síðani felagið í 2000 kom aftur í fremstu røð, hevur verið Sorin Anghel.

Sorin kom til Føroya undan kappingarárinum í 2000, og síðani tá hevur málið verið klárt.

- Eg minnist væl, tá Bergur Magnussen, sum var mín fyrsti venjari í Føroyum, spurdi meg, hvat eg vildi í EB/Streymi. Mítt svar var púrasta klárt, at eg vildi vinna nakað við hesum felagnum.

- Sjálvandi visti eg av, at her skuldi nógv arbeiði til, men málið hevur alla tíðina verið at vinna. Og nú hava vit so vunnið bæði steypakapping og FM-heitið, so hetta er bara heilt fantastiskt, sigur Sorin Anghel.

Í gerandisdegnum arbeiðir hann hjá Húsavarðatænastuni, har Sámal Erik Hentze, venjari hjá HB, er annar av stjórunum, og har Fróði Benjaminsen, sum er liðskipari hjá HB, eisini telist millum arbeiðsfelagarnar. Og tað verður ikki heilt frítt, at teir báðir sleppa at merkja, hvar FM-heitið er endað.

- Teir báðir hava argað meg nú í fleiri vikur. »Gummibein-gummibein« hava teir støðugt rópt eftir mær, so nú má tað vera mín túrur. Eg ætli mær so at gera eina rúgvu av skeltum, har tað skal standa meistarar og campeone. Og so skulu hesi annars klistrast um allan bilin, áðrenn eg komi til arbeiðis í morgin, sigur ein stórflennandi Sorin Anghel.

# Gott bonus-ár

**Á fótbóltsvøllinum rakk Egil á Bø øllum í 2008. Men upprunaliga skuldi hann als ikki vera partur av hópinum hjá EB/Streymi í ár**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Súru februar-kvøldini vóru gloymd, tá Egil á Bø kundi staðfesta, at tað so ruddiliga loysti seg at taka eitt fótbóltsár afturat í fremstu røð*
*Mynd: Sofus D. Johannesen*

Fyri einum ári síðani segði Egil á Bø, at hann neyvan fór at taka enn eitt tørn fyri Formula-liðið hjá EB/Streymi. Beinini vóru kanska vorðin dekan ov tung, og familjan og arbeiðið kravdu eisini sítt, so veteranurin ætlaði sær tá at stilla Formula-gaggurnar.

At hann lat seg yvirtala til enn eitt tørn, man hann neyvan angra í dag. Eitt ár, eitt FM-heiti, eitt løgmanssteyp og fimm landsdystir seinni var smílið í øllum førum stórt, tá litið var aftur á farna árið.

- Hetta er bara heilt ótrúligt. Eg havi vunnið FM fyrr, men at vinna tað við barndómsfelagnum, sum eg eisini eri ótrúliga góður við, er nakað heilt serligt. Ikki bara fyri meg, men fyri allar spælararnar.

- Og sjálvandi iðri eg meg ikki um, at eg tók eitt ár afturat. Sjálvandi var tað eitt sindur tungt í myrku og køldu tíðini, tá venjingin byrjaði aftur. Men at standa her sum føroyameistari í dag kann eg ikki annað enn vera errin av. Og tað hevur verið stuttligt allan vegin ígjøgnum, sigur Egil á Bø.

Leygardagin verður so dagurin, tá Egil skal taka ímóti stóra steypinum. Men enn hevur hann ikki gjørt av, um tað nú er tíð at gevast á toppinum, ella um hann fer at royna seg í Champions League-undankapping fyri EB/Streym.

- Tað tími eg ikki at hugsa um akkurát nú. Nú eru vit øgiliga glaðir fyri hetta, og hitt má eg so hugsa um eina ferð seinni, sigur Egil á Bø.

## Gjørdu okkara besta

**Tað var ikki frítt, at mótsetningarnir vóru stórir, tá Dagfinn Olsen bríkslaði fyri seinastu ferð á Skála týsdagin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Dimmið var við at seta seg yvir vøllin, og meðan viðhaldsfólkini hjá EB/Streymi tustu inn á vøllin, kundu teir hjá Skála bara staðfesta, at heldur ikki hetta var teirra dagur. Og heldur ikki varð árið teirra, nú teir longu seinasta umfar máttu staðfesta, at teir mugu tungu gongdina niður í aðru deild. Bara trý ár eftir, at teir høvdu vónað, at sigurssangurin hjá Freddie Mercury kuni ljóma yvir vøllin á Mýruhjalla. Tað gjørdi hann so týsdagin, men tað var ikki fyri Skála, at tónarnir ljómaður.

Eftir dystin tosaðu vit við Jónhard Frederiksberg, og hann kundi ikki staðfesta annað, enn at løtan var góð hjá EB/Streymi.

- Hetta er jú ikki heilt tað sama, men hetta er sjálvandi øgiliga stuttligt hjá teimum. Vit vóru annars øgiliga uppsettir til dystin í dag, har vit vildu gera okkara í seinasta heimadystinum, soleiðis at FM-spurningurin kundi útsetast til seinasta umfarið. Men teir spældu væl í dag, og teir vunnu okkum 3-1, so tað fáa vit ikki gjørt so nógv við. Ikki annað enn at ynskja teimum tillukku, segði Jónhard.

Hvussu verður á Skála komandi ár, veit Jónhard ikki at siga.

- Tað veit eg ikki. Nú ræður fyrst og fremst um at fáa hetta árið afturum, og so má tíðin vísa, hvat skal henda næsta ár, sigur Jónhard Frederiksberg.